# ítróttur

Nr. 242 • hósdagur • 17. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Mjølnir vann

Nakað seinkað kann besta mansliðið hjá Mjølnir nú fara í jólafrí. Upprunaliga skuldu teir um vikuskiftið spæla seinasta dystin í grundspælinum móti ÍF, men tá eingin dómari var møttur til dystin, varð hesin útsettur.

Mikukvøldið var dysturin so leiktur, men hóast seinkanina, so tóktust teir í Mjølni klárir til uppgávuna. Úrslitið gjørdist ein 3-1 sigur til klaksvíkingar, sum soleiðis hava lagt seg undir liðina á SÍ, sum tó hevur ein dyst eftir í grundspælinum.

-jm



*Fuglfirðingar vóru ikki fyri nothing, men teir megnaðu tó ikki at fáa stig við sær úr Klaksvík*

# Klárt til hálvfinalurnar

**StÍF, H71, VÍF og Kyndil vunnu sær mikukvøldið fram til hálvfinalurnar í steypakappingini hjá monnum**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tær fýra fjórðingsfinalurnar í steypakappingini hjá monnum vórðu leiktar mikukvøldið. Til og við fjórðingsfinalurnar er talan um styrkismeting undan lutakastinum, soleiðis at tey fýra liðini, sum eru ovast í fremstu deildini ikki renna inn í hvørt annað. Tí verður talan ofta í lítlan mun um nakrar serligar sensatiónir, og soleiðis varð eisini hesaferð.

## Veteranar gjørdu um seg

Einasta av liðunum í topp-4, sum koppaði, var KÍF. Teir leiktu á útivølli móti StÍF, og havandi í huga avrikini, sum StÍF vanliga hevur sýnt í steypakappingini hesi seinnu árini, so kann tað valla roknast sum nøkur sensatión.

Annars er stuttligt at síggja, at hóast tey bæði oddaliðini hittu lið, sum ikki spæla í fremstu deildini, so var tað ikki bara talan um sigrar, sum vórðu spákaðir til høldar. Nú eru 1. deild hjá Kyndli og 2. deild hjá VÍF kanska ikki tey veikastu liðini í hesum deildunum, og í fleiri førum er talan um heilt royndar leikarar.

Soleiðis var Jónleif Sólsker veruliga í essinum tá Kyndil var í Vestmanna, og við 13 málum sýndi hann, at hann framvegis kann hava nógv í sær. Har var Áki Olsen tó hansara yvirmaður við heili 15 málum, og tað var so heilt kraftiga viðvirkandi til sigurin hjá VÍF.

Og eisini í Havn, har »gamlir« VÍF'arar vitjaðu Kyndil, stóð eit sindur á. Hjalmar Klein Olsen gekk her á odda, men hóast 13 mál frá hansara síðu, so megnaði Kyndil kortini at koyra sigurin heim.

Seinasti dysturin var millum H71 og Neistin, og í sannari málveitslu eydnaðist her H71 at vinna. Eisini hóast teir hvørki høvdu Henrik Gerster ella Halgir Dahl Olesen á liðnum.

## FAKTA UM DYSTIRNAR

**Kyndil-VÍF III 32-25 (18-12)**

Málskjúttar
Kyndil: Høgni Klein 8, Ragnar Stakksund 5, Hans Áki Dal Christiansen 5(1), Josef Abrahamsen 4(1), Janus Einar Sørensen 3(1), Finnur Hansson 3, Jakob Jónsson 2, Rókur Akralíð 2
VÍF: Hjalmar Klein Olsen 13(4), Johnny Joensen 4, Oyvindur Brimnes 3, Rógvi Nielsen 2, Einar Brimnes 1, Sjúrður Holm 1, Marner Seloy 1, Rói Joensen 1
Brotskøst: Kyndil 3, VÍF 4
Útvísingar: Kyndil 3, VÍF 4
Dómarar: Heri Petersen & Brandur Johansen

**VÍF-Kyndil II 33-29 (16-10)**

Málskjúttar
VÍF: Áki Olsen 15(2), Ingi Olsen 7(3), Rúni Joensen 4, Agnar Joensen 3, Harald Bjørgvin 2, Áki G. Olsen 1, Jákup S. Andreasen 1
Kyndil: Jónleif Sólsker 13(4), Hjalti Jacobsen 6, Gunnar Wardum 5, Regin Fossaberg 3, Rani Ellingsgaard 1, Poul R. Mohr 1
Brotskøst: VÍF 5, Kyndil 5
Útvísingar: VÍF 2, Kyndil 2
Dómarar: Hartvig Joensen & Pole Hansen

**StÍF-KÍF 27-19 (14-9)**

Málskjúttar
StÍF: Alexandur Johansen 6(2), Borgar Danielsen 5, Leivur Justinussen 4, Sveinur Justinussen 4, Bárður Danielsen 3, Artur Johansen 2, Bent Djurhuus 1, Jón Rasmussen 1, Pauli G. Hansen 1
KÍF: Teitur Joensen 7(1), Regin Petersen 4, Petur Martin Poulsen 3, Sune Davidsen 2(2), Mirko Milenkvic 1, Gert Hansen 1, Jónálvur Johannesen 1
Brotskøst: StÍF 3, KÍF 5
Útvísingar: StÍF 4, KÍF 3
Diskvalifikatión: StÍF 1 (3X2 minuttir)
Dómarar: Dánjal Samuelsen & Hannis Wardum

**H71-Neistin 41-34 (26-20)**

Málskjúttar
H71: Piti Negru 13(2), Niels Viggo Niclassen 11, Heini Bendtsen 6, Christian Eli Zachariasen 4(1), Johnny Durhuus 4, Kent Failstrup 1, Esbern Patursson 1, Olaf Vestergaard 1
Neistin: Áki Mørk 15(2), Ólavur Brimnes 5, Rani Slættanes 3, Damir Oros 3, Tróndur Kragesteen 3, Zeljko Jotic 1, Jón Clementsen 1, Jón Ludvig 1, Dann Thorleifsson 1
Brotskøst: H71 3, Neistin 4
Útvísingar: H71 2, Neistin 5
Dómarar: Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen


Jólagávan



**Heimavirkið hevur fjølbroytt úrval av hondgjørdum vørum:**
Troyggjur til børn og vaksin, húgvur, vøttir, bundnaturriklæð, hosur, skóleistar, hýsar til føroysk klæðir, turrikløð, fyrikløð vovin og broderað - stimatroyggjur, stykkir til teinaskjúrt, møtlar, føroyskar húgvur, broderaðar vestar, hosubond, slíðrabond, ullteppir, borðleyparar, skinn, grindaknívar, smálutir úr træ o.m.a.

Eisini er Føroysk Bindingarmynstur eftir H.M. Debes, bindibókin "Bundnaturriklæðið" og "Planuliting" eftir Katrinu á Trøllanesi at fáa.

FØROYSKT HEIMAVIRKI
N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 17 67 · TÓRSHAVN

Sosialurin 34800